Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Útbúgvin á Heilsuskúlanum

Spurningar:

1. Hvussu nógv heilsustarvsfólk eru útbúgvin á Heilsuskúlanum síðani 2006?
2. Hvussu stórt hevur fráfalsprosentið verið síðani 2006?
3. Hvussu nógv eru upptikin á Heilsuskúlanum síðani 2006 í mun til tøk upptøkupláss hesi árini?

Viðmerkingar:

Vit útbúgva alt ov fá starvsfólk til eldraøkið – samstundis sum tørvurin á røktarstarvsfólkum veksur við rúkandi ferð.

Framskrivingarnar hjá Búskaparráðnum vísa, at vit hava tørv á 450 fleiri røktarársverkum í 2035, um tey, sum verða 80+ ára gomul í 2035 hava sama tørv og somu umstøður sum í 2024. Hetta er bara orsakað av demografisku broytingunum í samfelagnum, sum hava við sær, at vit gerast alsamt fleiri eldri.

Harafturat hevur verandi starvsfólkahópur rættiliga høgan miðalaldur, og roknast kann við, at uml. 300 av teimum núverandi 950 ársverkunum á eldraøkinum eru givin á arbeiðsmarknaðinum um 10 ár.

Tí er framtíðartørvurin á starvsfólkum upp ímóti 750 ársverk, um ikki munandi broytingar verða framdar á økinum. Og nógv arbeiða niðursetta tíð, so tørvurin á starvsfólkum verður munandi.

Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum, *Kommunubúskapurin og eldraøkið*, vísir á, at staðsetingin av Heilsuskúlanum er ein avbjóðing. Tað sama hava kommunur og fakfeløg gjørt vart við.

Vit mugu tí útbúgva fleiri starvsfólk til eldraøkið, samstundis sum onnur átøk eisini mugu fremjast. Fyri at kunna kjakast um hetta á upplýstum grundarlagi, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 1. oktober 2025

Liljan Weihe